FISKIVINNUTÍÐINDI

# Gólvuppboðssølan

Nakað oma fyri 128 tons vórðu seld um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum hósdagin. Størsti parturin av søluni var toskur, og millum annað vórðu eisini knappliga seks tons av teimum brádliga so væl umtóktu rognunum til sølu.

Í alt høvdu 105 bátar selt um gólvsøluna, og var sølan býtt á leið helvt um helvt ímillum Toftir og Klaksvíkina, meðan hálvt tons varð selt í Vági.

**jm**

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD | EINAR Á BRÚNNI | SNELLA | 1.253 |
| FD 102 | BYLGJAN | SNELLA | 574 |
| FD 112 | BARMUR | SNELLA | 1.278 |
| FD 124 | MÚLATINDUR | SNELLA | 640 |
| FD 136 | LILJA | SNELLA | 533 |
| FD 138 | BYRGI | SNELLA | 409 |
| FD 160 | SVANANES | SNELLA | 1.264 |
| FD 174 | SILVER BELLE | SNELLA | 1.365 |
| FD 193 | MARNA | SNELLA | 2.164 |
| FD 205 | GRETA | SNELLA | 778 |
| FD 219 | SJÓSØKI | SNELLA | 691 |
| FD 235 | STREYMSTEINUR | SNELLA | 365 |
| FD 322 | KLETTUR | LÍNA | 365 |
| FD 380 | AMANDA | SNELLA | 659 |
| FD 420 | REYNIR | SNELLA | 1.751 |
| FD 460 | SAFIR | SNELLA | 1.548 |
| FD 530 | NORÐSØKI | LÍNA | 970 |
| FD 553 | BRANDUR | LÍNA | 2.926 |
| FD 65 | EIK HELGADÓTTIR | SNELLA | 981 |
| FD 660 | FALKURIN | SNELLA | 970 |
| FD 733 | RIVTANGI | SNELLA | 1.039 |
| FD 750 | BRIMNES | SNELLA | 1.584 |
| FD 761 | GUNNVÁ | SNELLA | 751 |
| FD 771 | KATRIN | SNELLA | 898 |
| FD 775 | LANGANES | SNELLA | 593 |
| FD 808 | ALMA | SNELLA | 987 |
| FD 855 | LÓMUR M/B | SNELLA | 778 |
| FD 9 | JÓGVAN NORÐI | LÍNA | 976 |
| FD 900 | HØVNIN | LÍNA | 906 |
| FD 954 | VØRÐAN | SNELLA | 1.420 |
| FD 966 | UNI | SNELLA | 615 |
| FD 992 | KÚRBERG | SNELLA | 93 |
| FD1137 | RIVTANGI | SNELLA | 974 |
| FD1140 | EYÐIN | SNELLA | 680 |
| KG 135 | SVARTBAKUR M/B | SNELLA | 307 |
| KG 172 | SYÐRATANGI | SNELLA | 709 |
| KG 279 | NORÐBERG | LÍNA | 3.117 |
| KG 293 | FAGRAENNI | SNELLA | 4.927 |
| KG 323 | TURIÐ | LÍNA | 2.107 |
| KG 334 | NORÐAN | LÍNA | 2.394 |
| KG 407 | JØKUL | LÍNA | 782 |
| KG 45 | RANDI | SNELLA | 479 |
| KG 47 | HAVSBRÚN | LÍNA | 2.636 |
| KG 507 | SØKIN | LÍNA | 5.643 |
| KG 522 | SVARTABERG | SNELLA | 707 |
| KG 548 | ELIN H | SNELLA | 271 |
| KG 561 | FAGRIKLETTUR | SNELLA | 2.507 |
| KG 589 | KALLANES | LÍNA | 3.520 |
| KG 602 | LÍÐHAMAR | LÍNA | 2.086 |
| KG 603 | SJÓFRÚGVIN | SNELLA | 890 |
| KG 642 | BRAGD | LÍNA | 1.693 |
| KG 681 | NESTINDUR | SNELLA | 1.580 |
| KG 703 | HENNY | SNELLA | 1.266 |
| KG 716 | KARIN | SNELLA | 3.333 |
| KG 888 | RANNVÁ | SNELLA | 1.444 |
| KG 9 | KLAKKUR | LÍNA | 927 |
| KG 94 | BRID FORD | SNELLA | 732 |
| SA 130 | SYÐRABERG | SNELLA | 1.772 |
| SA 215 | BIRTU LIAS | SNELLA | 1.582 |
| SA 38 | VESTURBERG | SNELLA | 2.526 |
| SA 79 | INGIBJØRG | LÍNA | 29 |
| TG 60 | SJÓFARIÐ | SNELLA | 1.237 |
| TG 14 | HEYKUR | SNELLA | 843 |
| TG 185 | EGIL | SNELLA | 910 |
| TG 227 | EDVØR | SNELLA | 1.597 |
| TG 26 | MAJBRITT | SNELLA | 923 |
| TG 283 | HERDIS | SNELLA | 1.631 |
| TG 300 | LÍÐARBRØÐUR V/H. JOENSEN | SNELLA | 1.897 |
| TG 340 | SANCY | BOTNTROL | 148 |
| TG 401 | BARBARA | SNELLA | 691 |
| TG 460 | MARIANN | SNELLA | 1.148 |
| TG 56 | MARIAN M. | SNELLA | 822 |
| TG 576 | SVANUR | SNELLA | 2.797 |
| TG 607 | NÝBORG | PARTROL | 367 |
| TG 620 | BERGUR II | SNELLA | 1.053 |
| TG 622 | VARÐIN | SNELLA | 563 |
| TG 631 | SKARSTEIN | SNELLA | 2.063 |
| TG 91 | STJØRNAN | SNELLA | 777 |
| TN 117 | HAVALDAN | SNELLA | 683 |
| TN 164 | BORGARKLETTUR | SNELLA | 1.730 |
| TN 23 | ESPINGUR | SNELLA | 1.569 |
| TN 270 | TORGUN | SNELLA | 1.417 |
| TN 381 | SANCY | SNELLA | 637 |
| TN 390 | TRÝ SYSTKIN | LÍNA | 551 |
| TN 422 | NÓN | SNELLA | 380 |
| TN 460 | BRATTANES M/B | SNELLA | 997 |
| TN 753 | TÓRA | LÍNA | 1.231 |
| TN 81 | THOMMAS | SNELLA | 1.441 |
| TN 810 | GÓÐIDRANGUR | SNELLA | 865 |
| TN 919 | MORGUNROÐIN | SNELLA | 2.125 |
| TN 973 | ANNA KATRINA M/B | SNELLA | 1.503 |
| TN 992 | ÁRNASTEINUR | LÍNA | 1.745 |
| TN1071 | GUÐRIÐ | SNELLA | 127 |
| TN1090 | ANNIKA | LÍNA | 715 |
| VA 190 | SJÓBERIÐ | SNELLA | 656 |
| VA 213 | LEITISTANGI | SNELLA | 388 |
| VA 28 | ÁLITIÐ | SNELLA | 718 |
| VA 324 | SKARVUR | SNELLA | 801 |
| VA 350 | SIRIÐ | SNELLA | 975 |
| VN 132 | TORDIS M/B | SNELLA | 580 |
| VN 25 | TOFTAFOSSUR | SNELLA | 813 |
| VN 309 | ATLANTA | SNELLA | 952 |
| VN 430 | RUÐITANGI | SNELLA | 576 |
| VN 46 | VESTURROÐIN | SNELLA | 1.078 |
| XV 16 | KÓSIN P/F | BOTNTROL | 92 |

| Vørunavn | Kilo |
|---|---|
| BLÁLONGA 0 | 35 |
| BROSMA 0 | 209 |
| BROSMA 2 | 81 |
| BROSMA 3&4 | 77 |
| HÝSA 1 | 364 |
| HÝSA 2 | 812 |
| HÝSA 3 | 1.253 |
| HÝSA 4 | 294 |
| HAVTASKA 0 | 158 |
| HVÍTINGUR 0 | 327 |
| KALVI 2 | 21 |
| KALVI 4 | 19 |
| KONGAFISKUR 0 | 90 |
| LÝSINGUR | 3 |
| LIVUR | 30 |
| LONGA 0 | 26 |
| LONGA 1 | 24 |
| LONGA 3 | 20 |
| LONGA 4&5 | 102 |
| LONGA 5 | 45 |
| REYÐSPRØKA 0 | 82 |
| SIL | 3.086 |
| SKØTA | 180 |
| SKRUBBA | 17 |
| STEINBÍTUR | 608 |
| TOSKAROGN | 5.857 |
| TOSKUR 1 | 3.333 |
| TOSKUR 2 | 17.697 |
| TOSKUR 3 | 56.143 |
| TOSKUR 4 | 29.958 |
| TOSKUR 5 | 5.442 |
| TUNGA 0 | 74 |
| UPSI 0 | 675 |
| UPSI 1 | 400 |
| UPSI 1&2 | 44 |
| UPSI 2 | 767 |
| UPSI 3 | 188 |
| UPSI 4 | 15 |

# Norðborð tikin aðruferð

Vadsø (NTB): Herfyri fekk reiðaríið P/F Hvalnes, sum eigur Norðborg 50.000 norskar krónur í bót og skiparin 10.000 krónur fyri at hava framt júst saman lógarbrot sum hendu nú Norðborg seinast var tikin 50 fjórðingar norður úr Vardø. Vit vóna at stóra bótin hesuferð fer at læra skiparan, at tað ikki longur loysir seg at bera seg at á hendan hátt.

Norðborg hevur nú tværreisur innan stutta tíð fingið bót í Noregi fyri at lata vera við at melda til á einum ávísum staði, soleiðis at tað kundi staðfestast hvussu nógv teir høvdu inni. Í staðin fyri at steðga á og siga hvussu nógv teir høvdu fiska í norskum sjógvi, hildur teir leiðina fram í russiskan sjógv og fiskaðu víðari, skrivar (NTB) í norsku útgávuni av Interseafood.

# Eitur í spiki

Bodø(NTB): Spik av sildreka inniheldur so nógv av eiturevninum dixosin, at tað næstan ikki er etandi.

Kanningar av sildrekunum , sum vóru skotnir í 1999 og í fjør vísa, at eiturinnihaldið er sera høgt.

Skulu fólk fylgja ásetingunum frá heilsuheimsstovninum WHO, so er ikki ráðiligt at eta meira enn 20 gramm av sildrekaspiki um vikuna, tað svarar til fýra spísiskeiðir, skrivar (NTB) í norsku útgávuni av netsíðuni Interseafood.

Í Japan er markið fyri dioxineitri í hvali ikki størri enn 0,5 milligram pr. kilo av kjøti. Norskar kanningar sýna at eiturinnihaldið í sildrekan liggur heilt uppi á 3,6 milligram pr. kilo. Norðmenn óttast nú, at ætlaði útflutningurin av sildrekatvøsti til Japan verður av ongum.

# ES steðgar toskaveiðu

Brüssel(NTB)ES-nevndin setti týsdagin bann fyri allari toskaveiðu á eini leið norðanfyri og vestanfyri Skotland fyri at verja stovnin. Bannið verður sett til fyrst í apríl og liggur norðan fyri Hebridurnar og vestanfyri Skotland. Hetta bannið kemur oman stóru avmarkingarnar, sum er settar móti toskaveiðu í Norðsjónum. Hetta hendi í februar fyri at verja stovnin, skrivar NTB í norsku útgávuni av netsíðuni Interseafood.



# Bristow sær stórar møguleikar í Føroyum

OLJUFLÚGVING

*Jan Müller*

Herfyri kunngjørdi BP vegna øll fyristøðufeløgini á føroyska økinum, at Atlantic Airways og Bristow Helicopters í Bretlandi hava fingið uppgávuna at flyta fólk millum Føroyar og Aberdeen og millum boripallarnar og land.

Á samkomu í London í farnu viku, sum løgmaður hevði tikið stig til var eisini stjórin í Bristow Helicopters, Neill Osborne.

– Hjá Bristow meta vit avtaluna við Atlantic Airways at hava ómetaliga stóran týdning ikki bert í ár men eisini komandi árini, tá vit fara at víðka okkara virksemi til eisini at fevna um føroyska partin av Atlantsmótinum. Vit síggja fram til at skula arbeiða saman við føroyska flogfelagnum og vit fara at gera okkara ítarsta fyri at nøkta tørvin hjá okkara kundum, sum eru oljufeløgini sigur Neill Osborne við Sosialin.

Bristow eigur 120 tyrlur íalt, harav tær 40 arbeiða í Norðsjónum, har samstarv er við norska felagið Norsk Helicopters. Arbeitt verður so kring alla verðina saman við øðrum feløgum og er samlaða talið av tyrlum í hesum samstarvi meira enn 300.

Magni Arge, stjóri í Atlantsflog sigur seg vænta nógv gott burtur úr samstarvinum við Bristow.

Scotia, ið var hitt felagið, ið beyð seg fram at flyta fólk í føroyskum øki, er umleið á somu stødd sum Bristow, men felagið hevur ikki eins nógvar stórar tyrlur sum Bristow.



*Stjórin í Bristow, Neill Osborne her saman við Anfinn Kallsberg, løgmanni, Eyðun Elttør, oljumálaráðharra og Magna Arge stjóra í Atlantsflogi.*

*Mynd Jan Müller*

# Stórur áhugi fyri leiting í Hvíta økinum

**Umleið 20 oljufeløg og av teimum fleiri av heimsins størstu hava søkt um at leita eftir olju og gassi í 19. bretska umfarinum, sum er framvið føroyska markinum. Nógv bendir á, at áhugin fyri Atlantsmótinum er sera stórur**

19. ÚTBJÓÐING Í BRETLANDI

*Jan Müller*

Týsdagin í farnu viku lat 19. útbjóðingarumfarið í Hvíta økinum bretsku megin markið aftur. Hetta hendi sama dag sum løgmaður hevði boðið oljufólki til móttøku í London. Millum tey innbodnu var eisini nýggi stjórin í DTI (Department of Trade and Industry) Simon Toole, sum hevur avloyst John Brooks í hesum so týdningarmikla sessi.

Simon Toole váttar fyri Sosialinum, at áhugin fyri at bora eftir olju og gassi í 19. umfari á bretskum øki er sera stórur. Umleið 20 altjóða oljufeløg hava bjóðað uppá eitt rættiliga stórt tal av blokkum, sum aftur liggja spjaddir framvið markið til Føroyar. Nýggi DTI-stjórin, sum er hann, ið hevur endaligu avgerðina um komandi loyvini, sigur, at teir fara at hava samrøður við feløgini í mars og síðani verða loyvini latin skjótast eftir tað.

Sosialurin skilur, at fleiri av feløgunum, sum hava fingið verið við í føroysku útbjóðingini eisini eru við í tí bretsku. Hetta ikki minst tí at jarðfrøðin báðumegin markið í Hvíta økinum er hin sama. Tað hevur ljóðað, at m.a. Amerada Hess er hugað fyri at fara undir at bora bretsku megin markið longu í hesum árinum. Her hevur møguleikin verið nevndur, at felagið »hevur fatur« á einum og sama oljufelti (prospekti” báðumegin markið. Tað ljóðar eisini, at stór altjóða oljufeløg sum Shell, ið áður hevur verið sera virkið á Atlantsmótinum men sum tók seg aftur, nú aftur er á »bananum«. Og í hesum sambandi ber so til at leggja tvey og tvey saman, nevniliga at áhugi fyri at leita í bretska partinum av Hvíta økinum nátúrliga eisini má skapa áhuga fyri tí føroyska økinum.

Vit spurdu Simon Toole, hvussu bjartskygdur hann er um 19. umfar í bretskum øki. – Eg eri rættiliga bjartskygdur, tí her er talan um sera stórar strukturar í undirgrundini og prospekt í heimsklassa. Og eftir umsóknunum at døma sær hetta sera spennandi út. Simon Toole vil ikki í løtuni siga, hvørji feløg eru við millum umsøkjararnar, men hann váttar, at fleiri av teimum heilt stóru oljufeløgunum eru við. Sosialurin kann upplýsa, at talan er um bæði BP, Shell, ExxonMobil og aðrar tungvektarar. Í hesum sambandi eiga føroyskir oljumyndugleikar helst at geva sær gætur, at møguleiki kann vera fyri, at fleiri av stóru feløgunum, sum tóku seg úr aftur føroyska økinum so sum ExxonMobil og Shell, kanska koma inn aftur í hitan fyrr ella seinni.

Simona Toole váttar eisini fyri Sosialinum, at áhugin fyri Atlantsmótinum, sum bæði føroyski og bretski landgrunnurin eru partur av, er við at vaksa aftur, nú eftir at boringin hevur verið í minna lagi seinastu árini. – Vit mugu ikki undirmeta feløgini, sum hava víst áhuga í bæði tí føroyska og tí bretska partinum av Hvíta økinum. Tey vita, at her eru møguleikar at finna olju, og tí vilja tey eisini gera íløgur her. Tað kunnu so myndugleikarnir í Føroyum og Bretlandi bara vera fegnir um.



*Nýggi stjórin í DTI (høgrmegin) Simon Toole her saman við Herálvi Joensen, stjóra í Oljumálastýrinum og s Kjartan Hoydal, nevndarformanni í Atlantic Petroleum*

*Mynd Jan Müller*